TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pleygufamilja

Barnaverndarnevndin í Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir familju í Tórshavn, ið hevur hug at gerast pleygufamilja hjá einum 2 ára gomlum dreingi.

Pleygufamiljan skal skapa tryggar karmar um dreingin, virka fyri, at hann fær neyðuga umsorgan og í aðrar mátar vera mennandi í gerandisdegnum.

Vit vænta av familjuni, at hon er samstarvshugað mótvegis familjuni hjá barninum, barnaverndini og øðrum samstarvspørtum.

**Meira fæst at vita**
Um tit hava áhuga og ynskja at fáa meira at vita, kunnu tit venda tykkum til Sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu tlf. 315160 og spyrja eftir Sjúrði Johannesen, sosialráðgeva.

**Umsóknir**
Umsóknirnar, ið skulu vera nevndini í hendi innan tann 13. august 2001, skulu stílast til barnaverndarnevndina, Tórshavnar kommuna, postrúm 32, 110 Tórshavn.

SNARSKIVAN

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Ljóð-útgerð
til brúdleyp, føðingardagar o.a. til leigu.
Eisini fæst videokanón sera bíliga.
Intro
v/Dánjal Petersen
Gæsugøta 9
100 Tórshavn
Telefon 22 18 85

Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI
• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.
Spyr - tað kostar einki!
Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta
Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3212Navn: Sp/f J.K.H. Entreprenørar

Adressa: 640 Rituvík

Kommuna: Runavíkar Kommuna
Stovningardato: 01.06.2001
Viðtøkudato: 01.06.2001
Kapitalur: Kr. 200.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 200.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Jón Kári Højgaard, 640 Rituvík.
Stjórn: Jón Kári Højgaard, 640 Rituvík
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, 600 Saltangará
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.06.2001 - 31.12.2001.
Endamál: Endamál felagsins er søla, jørð og betongarbeiði o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 24. juli 2001

Kristin Balle

---

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3143, P/F TG 540, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 5. apríl. 2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 860.000,00 til kr. 1.860.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 860.000,00 til kurs 250
Nevnd: Innkomin í nevndina: Niels Jacob Thormund Nielsen, 490 Strendur og Kaj Christiansen, Havremarken 27, DK-7730 Hanstholm.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av trimum nevndarlimum saman.

Skráseting Føroya tann 24. juli 2001

Kristin Balle

---

www.sosialurin.fo




# Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum





Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

| | |
|---|---|
| 10x15 cm. kr. 80,- | 18x24 cm. kr. 150,- |
| 13x18 cm. kr. 100,- | 20x30 cm. kr. 200,- |
| 15x21 cm. kr. 130,- | 30x45 cm. kr. 350,- |

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ____
Síða: ____
Stødd: ____
Mongd: ____

Navn: ____
Bústaður: ____
____
Telefon: ____



# Zareptalegurnar 2001 – yvir túsund børn á summarlegu

*Í summarfrítíðini eru eini 150-200 børn á legu hvørja viku. Føst skrá er fyri legurnar frá 10.mai til 17.oktober*



**Hetta er tíðin tá summarlegurnar eru í fleiri støðum kring landið. Legurnar á Zarepta á Vatnsoyrum eru nú 34. árið á rað. Hvørja viku eru eini 150-200 børn á legu**

SUMMARLEGUR
*Magnus Gunnarsson*

Summarlegurnar sum eru á Zarepta á Vatnsoyrum í dag, byrjaðu við Áir í 1965. Ein av stigtakarunum til hesar legurnar var Brynleif Hansen trúboðari, sum doyði av flogvanlukkuni í Mykinsei 26. september 1970. Síðan Zarepta varð bygt í 1967, hevur verið neyðugt at bygt út fleiri ferðir, eins og nógvar umbyggingar hava verið gjørdar.



*Hóast hesir ikki vunnu fótbóltskappingina, vunnu teir 6-4 á mótstøðuliðinum seinasta dagin á summarleguni fyri 13 ára gomul. Fremra rað frá vinstra: Margeir Simonsen Fuglafjørður, Kári Steensen Helsinge, Bárður Áarstein Tórshavn, og Dánjal M. Joensen Tórshavn. Aftara rað: Pætur Holm Tvøroyri, Hávarður Olsen Gøtugjógv, og Osmund Lindberg Klaksvík*

### Stórur áhugi

Stórur áhugi er fyri hesum legum, sum hava eina fasta skrá frá tí at legan fyri brekað byrjaði 10.mai til heystlegan endar 17. oktober, umframt aðrar vikuskiftislegur. Til barnalegurnar sum eru í summarfrítíðini koma hvørja viku eini 150-200 børn, umframt starvsfólk og leiðarar, ið eru umleið hundrað í tali. Húsið hevur 300 seingjarpláss, og ofta er fullsett.

### Liðini kappast

Á summarlegunum eru skipaðar fótbóltskappingar, har tey ymisku liðini kappast á graslíkisvøllinum, eins og børnini kunnu tekna seg til súkklubátar ella róðrarbátar á Leitisvatni, rógva við kano í ánni, ella svimja í innandura svimjihylinum.

Hvønn morgun eftir morgunfimleikin á graslíkisvøllinum verður fyrsta ørindi av tjóðsanginum sungið meðan føroyska flaggið verður vundið á stong. Um morgunin eru bíbliutímar og andaktir, meðan flestu aktivitetirnir eru aftaná døgurða.

### Endamálið við legunum

Endamálið við legunum er at vinna børn og ung fyri Kristus. At fremja gott samanhald millum luttakararnar á legunum, at spæla og venja likamið. Leggja støði undir dagligar lívsmeginleglur, so sum at vera ásettum leglum lýðin, at fremja vanliga heilsurøkt og siðiliga atferð, og verja um náttúruna eins og mentanarvirðini. Liðini fáa karakter fyri t.d. borðsið, uppmøting og náttarfrið. Onki er at ivast í at tær legur sum verða hildnar á Zarepta, Nesvík og aðrastaðni kring landið, hava stóran andaligan og samfelagsligan týdning.

